# Sjálvsognarstovnurin ALV



Hevur tú skerdan arbeiðsførleika ?

"ALV hjálpir tær at fáa tað frá hondini"

## Rúmligur arbeiðsmarknaður

Ráðstevna verður á Hotel Føroyum 21. apríl

50 ár

Hvussu integrerast arbeiðstarnaði á fyritøkuni Rais?
Poul Knudsgaard, verksmiðjustjóri

"Visión 2015 og rúmligi arbeiðsmarknaðurin"
Jóannes Eidesgaard, løgmaður

Sí skránna á heimasíðu okkara

Vinarliga boðað frá luttøku áðrenn 18. apríl 2006 á tlf. 35 00 70

Øll eru hjartaliga vælkomin

ALV skúlin við Áir - Tlf. 42 21 37 - alvskul@post.olivant.fo - ALV verkstaðurin í Smiðjugerði - Tlf. 35 00 70 - alv@alv.fo - www.alv.fo



APOTEKSVERK FØROYA

**HÚSAVØRÐUR**

Tjaldurs Apotek søkir eftir húsavørð at byrja skjótast tiber.

**Starvið fevnir um:**
Innan- og uttandurða umsjón og viðlikahald av apoteksbygninginum á Trapputrøðni og av goymslu- og framleiðslubygninginum á Staravegi 15.

Viðlikahald og røktan av framleiðslutólunum.

Hjálpa til á goymslunum, í vørumóttøkuni og fyrifallandi arbeiði annars.

**Førleikar:**
Handverkaraútbúgving, maskin- og ella elektrikaraútbúgving, er ein fyrimunur.
Umráðandi er at umsøkjarin dugir at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.
Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er fyrikomandi, fittur í hondunum, raskur og álítandi.

**Løn:** Sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. mai 2006.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jonnu Hansen, apotekara, ella Kjartan Mohr, deildarleiðara, á telefon 341100

Tjaldurs Apotek
Postrúm 3010
110 Tórshavn





# Skrivstovufólk til Elding í Miðlon

**Í sambandi við at Elding er flutt í nýggj høli í Miðlon í Havn og at virksemi tí er munandi økt, søkja vit eftir skrivstovufólki at byrja skjótast tilber. Elding er førandi innan sølu av elektriskum lutum og hvítvørum. Høvuðsveitari hjá Elding er EL-Giganten, sum er størsta handilsketa av sínum slag í Norðurlondum.**

**Skrivstovufólk**
Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í nýggjum og spennandi umhvørvi, har høvuðsuppgávurnar hjá tær vera tollavgreiðsla og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Vit vænta at tú er ágrýtin, fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving og royndir innan skrivstovuyrki og at tú áður hevur fingist við tollavgreiðslu.

Løn og treytir í samsvari við útbúgving og royndir.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá Annu Mariu, á tel 350080.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 22. apríl 2006 og skal sendast til:

**Elding,**
**Postboks 1289,**
**110 Tórshavn,**
**att: Mads A. Winther.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ELDING

Elding, Miðlon, Postboks 1289, 110 Tórshavn